FØROYA TELE



# Sertreytir fyri Vinnu-breiðband og Samnet

# Innihald


| | |
|---|---|
| Sertreytir | 1 |
| Serlig viðuskifti | 1 |
| Serlig ábyrgd kundans | 1 |
| Brekfráboðan | 2 |
| Broytingar | 2 |
| Gildiskoma | 2 |

# Sertreytir fyri Vinnubreiðband og Samnet

Hesar viðskiftatreytir eru sertreytir í mun til vinnuviðskiftatreytirnar hjá P/f FT Samskifti; hereftir FTS. Um samsvar ikki er millum hesar treytir og vinnuviðskiftatreytirnar, eru hesar sertreytir galdandi. Har einki verður nevnt í hesum treytum, eru vinnuviðskiftatreytirnar hjá FTS galdandi.

**Vinnubreiðband**
Vinnubreiðband merkir breiðbandshald, ið eru tilskilað á ft.fo undir vinna. Við vinnubreiðband fæst hald við fríari nýtslu, beinara, uppsetan og levering. Breiðband uttan beinara kann veitast, um kundi sjálvur vil umsita beinaran.

Tað er fortreyt fyri veitan av tænastum sambært hesum sertreytum, at tað er tekniskt gjørligt at veita tænastuna á innleggingaradressuni; herundir at innleggingaradressan er staðsett innan fyri økið, har ið fipur- og kopartænastur hjá FTS kunnu veitast.

**Serlig viðurskifti**
- "Sømilig nýtsla" er galdandi. Tað kunnu vera náttúrligar, tekniskar avmarkingar á støddini á samlaða internetbreiðbandinum til ávís grannaløg ella vinnuøki í landinum. Fyri at gagnnýta samlaða plássið best møguligt til flest møguligt, kann tað koma fyri, at er nýtslan av tænastuni hjá ávísum kunda heilt óvanliga høg yvir eitt tíðarskeið, tilskilar FTS sær í serligum førum rætt til at stilla atgongdina hjá viðkomandi kunda.
- FTS kann raðfesta ferðsluinnihald, sum kann vera avmarkandi fyri tænastuna.
- Allar ávísingar til internetferð sipa til hægstu møguligu ferðina fyri ítøkiligu internettænastuna. Útgerð kundans, staðsetingin av útgerðini og frástøðan til íbindingarstaðið kunnu hava ávirkan á internetferðina.
- FTS hevur rætt til at broyta IP-adressur fyri vinnubreiðbandið. Kundi skal kunnast um hetta í rímiligari tíð, áðrenn broytingin fer fram.
- Ein fyritreyt fyri breiðbandstænastuni er, at kundi rindar linjugjald fyri sama matrikkul, sum breiðbandstænastan verður veitt til.
- Víðarisøla av øllum ella pørtum av haldinum er ikki loyvd. Rættindini til haldið – íroknað tilhoyrandi IP-adressur – fella aftur til FTS, tá ið haldið verður sagt upp.
- FTS tilskilar sær rætt at avvísa inn- og útgangandi teldupostar, ið FTS metir hava við t.d. virus, spam ella phishing at gera, umframt at steingja fyri internetsambandi, har FTS hevur orsøk at halda, at sambandið sannlíkt verður nýtt til eitthvør misbrúk ella ólóglig ørindi.

**Serliga ábyrgd kundans**
- Allar kundans upplýsingar í sambandi við møguliga innritan, loyniorð o.l. eru persónligar upplýsingar, og mugu ikki gevast víðari til óviðkomandi. Kundin ber sjálvur ábyrgdina, um onnur misbrúka hesar upplýsingar.

**Brekfráboðan**
Í sambandi við fráboðan av breki bindir FTS seg til, at í vanligari arbeiðstíð skal arbeiðið at finna og loysa brekið vera byrjað innan fyri ein tíma. Er tørvur á, at FTS finnur og loysir brekið á ávísum staði í vanligari arbeiðstíð, bindir FTS seg til, har ið landfast er, at hetta arbeiðið er byrjað innan fyri tríggjar tímar eftir móttøku av brekfráboðanini.

Uttanfyri vanliga arbeiðstíð kann úrtíðararbeiði í sambandi við umvæling av breki vera umbiðið til fastan prís, umframt møguligan eykakostnað. Fráboðast kann á tel. 809047 alt samdøgrið.

**Broytingar**
Broytingar í hesum sertreytum, ið sum heild eru til fyrimuns fyri kunda, kunnu setast í verk beinanvegin og uttan aðra ávaring frammanundan. Aðrar broytingar kunnu setast í verk við minst einum mánað ávaring til eitt mánaðarskifti.

**Gildiskoma**
Hesar sertreytir fáa gildi frá 1. februar 2021. Møguligar seinni broytingar í sertreytunum fyri Vinnubreiðband og Samnet eru at finna á ft.fo undir vinna.